# Óli er komin aftur til øðrvísi felag

**Ambitiónirnar og virksemið er ikki longur tað sama, sum tá ið Óli Johannesen seinast var í Hvidovre, men føroyski landsliðsspælarin trívist væl í felagnum**

EYÐUN KLAKSTEIN

Óli Johannesen er farin aftur til Danmarkar at spæla fótbólt.

Eftir royndarvenjingar í Skotlandi og Kina, har einki ítøkiligt kom burturúr, valdi hann at flyta til Hvidovre, har hann áður hevur spælt

– Eg og gentan hjá mær høvdu hug at flyta aftur til Danmarkar, og Hvidovre var áhuga at fáa meg til felagið at spæla, so tað endaði við, at vit gjørdu eina avtalu, sigur Óli.

Í fjør spældi hann við TB, sum flutti úr bestu deildini, men landsliðsmaðurin, sum hevur spælt flestar landsdystir, hevur nú tikið við eini størri avbjóðing.

– Tað kennist gott at vera aftur í Hvidovre. Lagið er gott, hóast liðið er í botninum í 1. deild, og tað kemst kanska av, at teir spælararnir, sum nú eru á liðnum, hava ikki spælt felagið í hesa støðu. Hetta eru flest allir nýggir spælarar, sigur Óli.

### Hava repað seglini

Hvidovre stríðist í botninum í næstbestu donsku deildini. Teir hava ligið undir strikuni, men tað er tætt millum tey aftustu liðini.

– Vit trúgva upp á, at tað letur seg gera at spæla okkum úr niðurflytingarvandanum. Liðið er gott, og vit hava fingið nøkur góð úrslit her í seinnu hálvu, sigur hann.

Ætlaninar vóru stórar í Hvidovre, seinast Óli Johannesen var har, men nú hevur felagið repað seglini, tí fíggjarliga baklandið er ikki so sterkt longur.

Eingir spælarar hava fulltíðarsáttmálar, og tað eru ikki eins nógv starvsfólk í felagnum annars.

– Nógvir av spælarunum, sum nú eru í felagnum, eru komnir frá feløgum í lægri deildum. Teir vilja sleppa at royna seg í 1. deild, og eg haldi, at felagið hevur dugað væl at savna eitt gott lið, sigur Óli Johannesen.

Venjari í felagnum er Jan Christensen, sum er ein lutvíst ungur venjari.

### John Heri í felagnum

Havnamaðurin John Heri Dam hevur eisini roynt seg í Hvidovre farnu mánaðirnar. Hann var við í hópinum til allar venjingardystirnar, men síðani hevur hann verið eitt sindur óstøðugur til venjingina.

Í Hvidovre rokna teir tó framvegis við føroyska spælaranum.




*– Vit trúgva upp á, at tað letur seg gera at spæla okkum úr niðurflytingarvandanum. Liðið er gott, og vit hava fingið nøkur góð úrslit her í seinnu hálvu, sigur Óli Johannesen.*
Mynd: Álvur Haraldsen

# Jón Rói stríðist fyri plássinum

**Jón Rói Jacobsen er ikki vorðin fastur maður í Brøndby enn, men hann hevur spælt í superliguni, og næstu mánaðirnar skal hann vísa, at tað loysir seg hjá danska felagnum at gera sáttmála við hann**

EYÐUN KLAKSTEIN

Jón Rói Jacobsen skal næstu mánaðirnar vísa, at hann hoyrir heima á superligaliðnum hjá Brøndby.

Jón Rói hevur sáttmála við Brøndby fram til summarsteðgin, og hesa tíðina skulu partarnir hyggja nærri at hvørjum øðrum. Í Brøndby halda teir nógv av fótbóltsevninum hjá unga føroyska landsliðsmanninum, og gongur tað væl hjá Jón Róa í vár, ætlar danska felagið at gera sáttmála við hann.

### Spældi nógv

Í fyrireikingini til seinnu hálvu av donsku kappingini var Jón Rói nógv við hjá Brøndby. Hann spældi fleiri heilar dystir sum verjumaður, og hann slapp eisini at royna seg longri frammi á vøllinum í venjingardysti í Onglandi, og tá skoraði hann eisini eitt mál.

Royndi Per Nielsen, sum onkuntíð er við á danska landsliðnum, er fastur maður í miðverjuni, og Jón Rói var upp á tal til hitt plássið. Tað er tó kapping um plássini, og higartil hevur Dan Anton Johansen spælt á hesum plássi.

Jón Rói byrjaði inni fyrsta dystin eftir summarsteðgin, og tá spældi hann í høgru síðu í verjuni. Síðani hevur hann ikki spælt so nógv, men hann er við í kappingini um plássini á liðnum.

### Landsliðið

Jón Rói hevur spælt bæði sum verjuspælari og álopsmaður í HB, men hann verður alsamt meira mettur at vera verjuspælari.

Á landsliðnum hevur hann fingið plássið undir liðini á Óla Johannesen, og hesa uppgávu hevur hann røkt til lítar – til dømis í trupla útidystinum ímóti Týsklandi í fjørheyst.

Jón Rói verður ein av berandi kreftunum á landsliðnum komandi árini, og fær hann sáttmála við Brøndby kann hann leggja eitt gott grundarlag undir yrkisleið sína sum fótbóltsspælari.




*Jón Rói Jacobsen, sum hevur fingið fast pláss í verjuni hjá føroyska landsliðnum, roynir nú at sannføra Brøndby um, at samstarvið millum partarnar skal halda fram eftir summarsteðgin.*
Mynd: Álvur Haraldsen









